

# RIMMAR EM-KAPPING

Tað er ikki long tíð, áðrenn EM-kappingin í fótbólti fer á rull. Ivaleyst er spenningurin undan hesum stórur hjá flestu fótbóltshugaðum føroyingum, men nú kann hesin gerast enn størri.

Saman við Kiosk Steinatún fer Sosialurin nevnliga at skipa fyri einum EM-spæli, har hópur av góðum vinningum standa uppá spæl. Og vinnarin fær einki minni enn eina fótbóltsferð eftir egnum ynski í Europa, soleiðis at til ber at vitja hjá júst tí liðnum, sum liggur tínum hjarta nærmast.

Hjá luttakarunum ræður her um at gita, hvussu útfallið í teimum 31 dystunum í EM-kappingini verður. Hetta verður gjørt við at fylla út veddingarseðlarnar, sum verða at fáa í blaðnum undan og undir EM-kappingini, og síðani skulu hesir sendast inn. Men fyrst skal liðið ella liðini hjá tær teknast til kappingina við niðanfyristandandi haldaralepa.

**Eru ivamál, ber altíð til at ringja og spyrja seg fyri, og skal hetta gerast á tlf. 22 01 06**

## VINNINGARNIR

Vinningarnir, sum verða latnir besta veddaranum, eru hesir:

1. Ein fótbóltsferð eftir egnum ynski til dyst í Europa. Latin av MB-Tours
2. Ein ferð til dyst millum FCK-Brøndby, latin av MB-Tours
3. Ein Apex-ferðaseðil frá Atlantic Airways
4. Gávukort frá Føroya Bjór áljóðandi 1.500 kr.
5. Eitt gávukort frá Thomas Dam ítrótti á 1.000 kr.
6. Ein døgurði fyri tvey á Hotel Føroyum
7. Árskort frá HB
8. Árskort frá B36

## REGLUR FYRI EM-SPÆLIÐ

- Tekningarlistin til stóru EM-kappingina í fótbólti verður at fáa í Sosialinum. Ynskir tú at taka lut í kappingini, verður seðilin niðanfyri útfyltur og sendur inn.
- Kostnaðurin fyri luttøku er 100 kr. fyri hvørt liðið. Hvør luttakari kann væl hava fleiri lið, og skulu hesi tá navngevast við nummari. T.d. Hans Hansen 2. Luttakarin hevur tá sjálv/ur ábyrgdina av, at navnið á liðnum er rætt útfylt, tá veddingarseðlar verða sendir inn. Eisini tey, sum taka lut við einum liði, skulu útfylla teigin til nummarið, sum tá bert er 1.
- Luttøkugjaldið skal flytast á konto í peningastovnunum. Antin á 6460-168.583.1 ella á 9181-141.977.5. Tilmeldingin er galdandi, tá vit hava skrásett inngjaldið. Navn á liði skal tilskilast á inngjaldinum.
- Í kappingini verður spælt 1x2. Sum dømi kunnu vit nevna dystin, Danmark-Italia. Roknar tú við, at Danmark vinnur, skrivar tú 1. Heldur tú at javnleikur verður úrslitið, skrivar tú x, og um tú heldur, at Italia fer at vinna dystin, skrivar tú 2. Soleiðis krossar tú av allar 31 dystirnar í kappingini. Tann spælarin, sum hevur gitt flestar dystir rætt, vinnur kappingina.
- Fimm umfør verða í kappingini, og verða veddingarseðlar fyri hvørt umfarið sær at finna í Sosialinum, har ein veddingarseðil verður fyri hvørt umfarið í kappingini. Fyri hvørt umfar skulu luttakararnir fylla út veddingarseðilin og senda hann inn innan evstamarkið, sum er prentað á seðlinum. Einans seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum, verða roknaðir sum galdandi. Er talan um avrit av seðlum, verða hesi ikki tikin við.

Evstamark fyri tilmelding er leygardagin, 5. juni, og eiga bæði luttøkuseðil og gjald at vera okkum í hendi innan ta tíð, um tilmeldingin skal verða galdandi.

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn

Fornavn ____________________

Eftirnavn ____________________

Føðingardagur ____________________

Lið nr: ____________________

Bústaður ____________________

Postnr. og staður ____________________

Sosialurin & Kiosk Steinatún




# Vikuskiftisskeið

til endurtøku av koyrikorti og eftiransandi koyriroynd verður leygardagin 29. mai kl. 10-16. Skeiðið tekur 2 vikuskifti.

# Motorsúkkluskeið

byrjar týsdagin 1. juni kl. 19.30

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99 • 21 10 96
John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn



Suzuki Intruder VS 750 DL



*Árgang 91 · km. 37.000*

*til sølu fyri 75.000 kr.*

**Ring 33 30 70 ella 53 30 70**



Søkt verður eftir reinskerarum, at byrja beinanvegin.

**Sp/f Tavan · 520 Leirvík**
**Tlf. 213155**



SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

# Skrivstovu-næmingur

Á Dómaraskrivstovuni er eitt lærupláss leyst at søkja til setan 1. august 2004.

**Vit vænta:**

- at tú hevur fráfaringarroynd fólkaskúlans og FHS-HH-prógv ella líknandi
- at tú dugir væl at skriva føroyskt og danskt
- ert fyrikomandi
- hevur góð samstarvsevni

**Útbúgving:**

- almenn fyrisiting
- næmingurin fær útbúgving innan øll málsøki á Dómaraskrivstovuni
- lærutíðin fyri næming við FHS-prógvi er 3 ár og fyri næming við HH-prógvi 2 ár
- Í lærutíðini skal næmingurin til Danmarkar á handilsskúla í 15 vikur tilsamans
- løn og setanarviðurskifti sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 31 10 03.

Umsókn, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 18. juni 2004.

**Sorinskrivarin í Føroyum**
tann 25. mai 2004

Jørgen B. Petersen
adm. sorinskrivari



# Álítandi fólk til Cafe Natúr



Vit søkja eftir einum røskum og arbeiðssomum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
Tú verður okkara álitisfólk, og fert at arbeiða skiftandi vaktir og um vikuskiftið.
Løn sambært avtalu.
Starvið verður sett skjótast gjørligt.
Skrivlig umsókn skal sendast til platform@platform.fo ella til:

Café Natúr
Boks 3085
110 Tórshavn
Viðm. Umsókn

CAFÉ NATÚR
MAERSK AIR



Runavíkar kommuna søkir eftir

# Pedagogum og avloysara

## til Barnagarðin á Mýrunum

Barnagarðurin á Mýrunum er normeraður til 82 børn. Stovurnar eru skipaðar við 2 vøggustovum við 14 børnum í hvørjari, og 3 barnagarðstovum við 18 børnum í hvørjari.

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felagsrúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.

Endamál stovnsins er, við støði í tí einstaka barninum, at geva tí møguleika at mennast, bæði persónliga og saman við øðrum. Fyri at røkka málinum er neyðugt við einum tryggum og stimbrandi umhvørvi, við góðum samstarvi millum leiðslu, starvsfólk og foreldur.

Vit ynskja tí at umsøkjarin:

- hevur umsorgan fyri børnunum
- hevur góð samstarvsevni
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin
- er nýhugsandi og ígongdsetandi

Søkt verður eftir 5 pedagogum á 35/40 t. um vikuna, lønarstig 10-16.

Setan verður frá 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita við at tosa við Fríðu Lómstein, leiðara ella Conny Jacobsen, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða kommununi í hendi í seinasta lagi 8. juni 2004 kl. 12:00

**Runavíkar kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará



# Kassafólk

Søkt verður eftir fólki at byrja skjótast gjørligt, arbeiðið umfatar fyri tað mesta at sita við kassan og tíðirnar eru skiftandi, deildar í 4 vikur, løn eftir S & K.

Meira kann fáast at vita um arbeiðstíðir við at ringja tlf. 51 13 46.

Skriftlig umsókn skal sendast til

**Spf. PE**
**Postboks 3320 · FO-110 Tórshavn**